## 214 kvinnur runnu

Fyriskipararnir úr Bragdinum vóru ovfarin, tá tað var greitt, hvussu stórur áhugin var, nú felagið á fyrsta sinni skipaði fyri kvinnurenning.

Kvinnurenning hevur verið vanligt í londunum kring okkum í fleiri ár, men hetta er so fyrsta ferðin, at skipað verður fyri slíkari renning her í Føroyum. Talan er einamest um eina sonevnda motións-renning, men hóast heiðursmerki ikki verða latin, so bar sjálvandi til hjá luttakarunum at fáa tíðir sínar at vita.

Skjótasta kvinnan á mál var annars Valborg Heinesen. Henni næst var Sunnevá Bjarnastein, og á trijða plássinum var Ann Thomsen.

Øll úrslitini eru tøk á heimasíðuni hjá Bragdinum.

-jm

## Ongland, Skotland og Kroatia

Skráin fyri EM-undankappingina hjá føroyska U-19 landsliðnum í kvinnufótbólti er nú løgd. Føroyar komu her í bólki við Onglandi, Skotlandi og Kroatia, og einki er at ivast í, at talan verður um sera trupla uppgávu.

Føroyski venjarin, Álvur Hansen, er tó farin undir uppgávuna við góðum treysti, og hann hevur nú úttikið bruttohópin til ferðina. Í hesum eru Rannvá Poulsen, Simona Heinesen og Vilhelmina Olsen, AB, Barbara Langgaard, Rúna Højgaard og Sarah Ann Thomsen, B36, Rakul Magnussen, Mildrið Djurhuus og Rudi Zachariassen, EB/Streymur, Anna Joensen, KÍ, Sigrid Petersen, ÍF, Gunvá Pálsson, GÍ, Hanna Isaksen, B68/GÍ, Heidi á Lakjuni, Jacoba Langgaard og Heidi Sevdal, NSÍ/GÍ, Unn Hansen, NSÍ, Svava Vestergaard, Monika Samuelsen og Miriam Michelsen, VB, Rutt Thomsen og Kristina S. Joensen, MB, og Mary-Ann Isaksen, Skjold BK (Danmark).

Kappingin í Onglandi verður spæld í døgunum 26. september til 3. oktober.

# Toppskjúttin er aftur

**Eftir trý ára fráveru var Uni Arge aftur at síggja á besta HB-liðnum. Og eftir bara 40 sekundum hevði hann givið greið boð um, at hann enn telist millum vandamestu spælararnar í føroyskum fótbótli**

COME-BACK
*Jákup Mørk*



*Til dystin móti NSÍ mátti Uni geva avboð, tí hann skuldi vera vertur á 3-2 sendingini. Hesa ferð var tað tó hinu megin upptøkutólið, at hann kom á skíggjan*

Tað var ikki í tonkunum, at hann einaferð aftur skuldi spæla fótbólt í fremstu føroysku deildini.

Eftir at hann á sumri 2002 noyddist at gevast við fótbóltinum, ráddi tað fyrst og fremst um at fáa heilsustøðuna í rættlag hjá Una Arge. Fleiri vóru tey, sum mundu møta málrevinum spákandi í Viðarlundini, ella kanska smárennandi kring vøllin í Gundadali.

- Eg var ræðuliga illa fyri. Eg hevði havt trupulleikar við rygginum, og tað hevði so aðrar fylgjur við sær. Snøgt sagt, so var allur kroppurin úti av javnvág, og tað tók mær eisini hálvt annað ár at koma fyri meg aftur.

*Roknaði tú tá nakran tíð við, at tú aftur fór at spæla fótbólt á høgsta støði?*

- Yvir høvur ikki. Eg ikki so mikið sum hugsaði um fótbóltin hesa tíðina. Í fjør varð eg so biðin um at koma við á fjórðu deildar liðið hjá okkum. Tað, sum vit róptu Dream Team.

- Tað gekk bara heilt væl, og í ár hugsaði eg so, um eg ikki skuldi fara at royna meg á eitt lítið sindur hægri støði. Eg haldi, at tað sum veruliga gav mær seinasta skumpið, var, at Heine Fernandez ringdi til mín tíðliga í ár fyri at vita, hvat eg ætlaði mær.

*Og vart tú so klárur alt fyri eitt?*

- Nei. Langt ífrá. Eg segði honum, at eg í øllum førum vildi royna meg sjálvan fyrst. Og at eg als ikki ætlaði at hugsa um besta liðið fyrstu fýra mánaðirnar. Tað hevur tó víst seg, at tað gekk soleiðis hampuliga væl, og nú havi eg so aftur roynt meg á besta liðnum. Eg skuldi sum so longu vera við í hópinum seinast, men ta ferðina mátti eg geva avboð, tí eg skuldi verða vertur í 3-2 sendingini.

### Minti um debut'ina

Men sunnudagin var tíðin so komin. Fagnaðurin í HB-skýlinum var stórur, tá maðurin við átta talinum varð skiftur inn, og hann gjørdist ikki minni stórur, tá Uni eftir bara 40 sekundum á vøllinum hevði skorað.

Og eftir dystin fjaldi málskjúttin ikki, at hann var fegin um at vera aftur. Og ikki minst, at hann við hesum fekk lagt afturat teimum tølum á ævinleikatalvuni hjá HB, har Uni er maðurin við nógv flestu málunum.

- Hetta minti næstan um, tá eg debuteraði fyri eini 17 árum síðani, helt Uni við einum stórum brosi.

Og so er spurningurin bara, um Uni nú aftur kann fáa ein eins týðandi leiklut, sum hann hevði seinasta partin av 80'unum og flestu av 90'unum. Fyribils er staðfestingin í øllum førum, at HB við hesum hevur fingið ein jokara, sum kann geva vágskálini eyka tyngdina, sum helst verður neyðug, nú tað av álvara er farið at stunda til í endaspurtinum.

HB-TB 4-1 (3-0):

# Linligt í Gundadali

**Við sera einføldum spæli, og uttan at spíla seg út, vann HB tryggan sigur á TB, sum veruliga skal lyfta seg, skal hóttandi niðurflytingin ikki skal gerast veruleiki**

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað var ikki stórvegis ivi um, at toppliðið var betri enn botnliðið, tá HB sunnudagin tók ímóti TB. Í einum dysti, sum fyrst og fremst var merktur av, at spælararnir á báðum pørtum helst undan dystinum høvdu góðtikið, at talan skuldi gerast um tryggan heimasigur.

### Sløsut verjuspæl

Tað var annars TB, sum gjørdi mest um seg fyrstu løtuna. HB'arnir tóktust als ikki vera komnir á vøllin sálarliga, og einar tvær ferðir var TB um at fáa heilt góðar møguleikar. Men teir megnaðu ikki at taka av, og tá HB so fekk møgulelikan hinvegin, vóru teir nakað nógv meira avgjørdir.

Janus M. Joensen sendi innfyri úr vinstru. Bárður Mortansson stóð mest sum púrasta ómarkeraður, og tá eingin tvøramaður fór eftir bóltinum, langaði Bárður til fyrstu ferð, so bólturin smeyg sær niður í longra hornið.

Stutt eftir varð dysturin mest sum avgjørdur, og hesa ferð var tað tvøramaðurin hjá HB, Rasmus Nolsøe, sum kundi senda bóltin í kassan. Sum vanligt freistast tú at siga, var talan um beinleiðis fríspark, sum Rasmus sendi av brotsteigarhorninum og niður við nærmasta stólpa.

Og tá Bárður lítla løtu seinni varð spældur púrasta blankur, fór tað av álvara at líkjast sori. Ferð eftir ferð varð TB-verjan skrødd sundur, tá heimaliðið skjótt og einfalt spældi bóltin runt á vøllinum. Javnvágin í verjuni varð at kalla als ikki til, og høvdu HB'arnir verið bara eitt lítið sindur effektivir, so vildi talan helst verið um tennis-tøl longu undan steðginum.

### Úrslitið var góðtikið

Í góðveðrinum í Gundadali vóru áskoðararnir vitni til ein seinna hálvleik, har millum lítið og einki at týdningi gekk fyri seg.

Hvørgin parturin tóktist leggja nakað í verjupartin, og báðir partar høvdu fleiri meira ella minni opnar møguleikar. Um miðjan hálvleikin kom TB tó á talvuna, tá Dejan Tomic umsetti brotssparkið, sum Hans á Lag framdi móti TB, men lítla løtu seinni var munurin aftur trý mál.

Uni Arge, sum annars ikki hevur spælt á besta HB-liðnum síðani 2002, varð skiftur inn, tá TB hevði skorað upp á brotssparkið. Og tað tók honum heldur ikki meira enn góð 40 sekund, áðrenn hann hevði sýnt eyðkenda máltevið.

Eitt fríspark fann onkursvegna veg til føtur hansara, og eftir at hava drigið framvið fyrsta verjuspælarunum, hamraði hann úr 16 metrum bóltin upp í handara málhorn. Vildi væl til, so kundi Arge-maðurin eisini skorað enn einaferð, tá hann varð spældur mest sum elysur, men hetta var bara enn ein misnýttur møguleiki í dystinum, sum altso ikki hevið tað heilt stóra uppá seg leikliga. Fyrst og fremst, tí HB longu undan dystinum helt seg hava vunnið hann, og tí TB eisini undan dystinum hevði góðtíkið, at teir fóru ikki at fáa nakað burturúr.

## FAKTA UM DYSTIN

**HB-TB 4-1 (3-0)**
1-0: Bárður Mortansson, 7.
2-0: Rasmus Nolsøe, 15.
3-0: Bárður Mortansson, 25.
3-1: Dejan Tomic (br.), 70.
4-1: Uni Arge, 71.
**Dómari:** Eiler Rasmussen. Tað vóru ikki bara spælararnir, sum høvdu ilt við at savna seg um dystin.
HB: Bárður Johannesen - Hallur Danielsen, Svenn F. Jacobsen, Rasmus Nolsøe, Janus M. Joensen - Vagnur M. Mortensen, Rúni Nolsøe, Kári Nielsen, Jákup á Borg (Tór-Ingar Akselsen, 60.) - Bárður Mortansson (Rókur Jespersen, 78.), Hans á Lag (Uni Arge, 70.)
**GK:** Hans á Lag, 34
**TB:** Predrag Markovic - Predrag Zivkovic (Jón Tórur Holm, 68.), Aca Petrovic, Óli Johannesen, Jón Johannesen - Dan Mortensen, Alexxandar Jovevic, Einar Petersen (Birgir Rasmussen, 90.), Allan Poulsen (Búi Mortensen, 77.) - Dejan Tomic, Hallur Christiansen
**GK:** Predrag Zivkovic, 62.